

# Boys in a Band

Hjartaliga tillukku við frálíka úrslitinum á GBOB í London og góða eyðnu framyvir

ynskja

Eiðis Kommuna Gøtu Kommuna Leirvíkar Kommuna

## Lisbeth og Henrik siga stopp

Fleiri profilar í føroyskum politikki stilla ikki upp aftur á løgtingsvalinum í januar, og harvið takka teir fyri seg í landspolitikki. Tveir av hesum politikarum vitja í morgunsendini mikumorgunin. Henrik Old hevur sitið í løgtinginum seinastu 23 árini, men nú tekur hann seg aftur, og tað sama ger Lisbeth L. Petersen, sum varð vald í løgtingið fyrstu ferð í 1990. Tey bæði fara at hugleiða um tíðina í politikki, hvørjar stóru løturnar hava verið, og hvat tey vildu havt gjørt øðrvísi.

2 RÁS ...títt radio

## Jólamatur og íløgur

Í morgunsendingini mikudagin verður eisini tosað um jólamat og um íløgur, og vit spyrja, hvussu tað kann bera til, at fólk vilja gjalda upp í 60.000 krónur fyri eina konsert við rockbólki, sum ikki hevur spælt saman í 19 ár.

MORGUNSENDINGIN
Mikudagin 9.00-12.00

eydna & eyðun





## Nyrup á Rás 2

Mikudagin verður samrøða við fyrrverandi danska forsætismálaráðharran Poul Nyrup Rasmussen í morgunsendingini á Rás 2. Nyrup hevur júst givið nýggja bók út um hugtakið kasinoøkonomi, sum hann heldur er ein hóttan móti samfelagnum og vælferðini. Tosað verður við hann um bókina og hugtakið, og eisini verður tosað um, hvat hann hevur fingið tíðina at ganga við, síðani hann fór úr sessinum sum forsætisráðharri í Danmark.

Starvslýsing

Heimatænastan

## Deildarleiðarar til Heimatænastuna í Suðurstreymoy - øki 1

Heimatænastan í Suðurstreymoy søkir eftir deildarleiðarum.

Heimatænastan í Tórshavn er býtt í 3 økir, Vestur-, Eystur- og Miðøkið. Í hvørjum øki er ein tvørfakligur bólkur av starvsfólki við heilsuhjálparum, heilsurøktarum og sjúkrarøktarfrøðingum. Til hesar tvørfakligu bólkarnar sóknast vit eftir 3 deildarleiðarum.

Deildarleiðarin hevur dagligu leiðsluna av einum tvørfakligum bólki og samstarvar í toymi saman við hinum deildarleiðarunum og deildarleiðaranum fyri sambýlini.

Deildarleiðararnir eru undir leiðslu av økisleiðaranum. Uppgávan verður, saman við starvsfólkunum og leiðslutoyminum at skipa eina samansjóðaða tænastu, har vit við umsorgan stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka borgaranum.

**Vit vænta av tær, at tú**
- Hevur útbúgving innan heilsurøkt
- Hevur hug og hegni at leiða og fyrisita
- Evnar at samstarva við bæði brúkara, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur telduførleika á brúkarastøði
- Royndir og útbúgving í fyrisiting og leiðslu er ein fyrimunur

**Sum deildarleiðari hevur tú ábyrgdina av**
- Dagligu leiðsluni og fakligu ábyrgdini av veittum tænastum.
- At leiða, stuðla og menna starvsfólki
- At virka verður innan givnar fíggjarkarmar

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvið
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning

**Setanartreytir**
Lønar og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meira um starvið kann tú venda tær til Ceciliu Vestureið, økisleiðara, ceciliav@naerverk.fo , tlf. 31 72 49 ella 21 72 49

**Umsókn**
Umsóknin skal sendast og stílast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
100-Tórshavn
Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari
Viðmerkt: umsókn

**Umsóknarfreist 14. desember 2007 kl. 12.00**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ

VIVA

